# Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 29

ISSN 0907-905X


Nr. 100

15. juli 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um avreiðing av feskum uppsjóvarfiski at frysta ella meirvirka í Føroyum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 6 frá 20. januar 2005 um avreiðing av feskum uppsjóvarfiski at frysta ella meirvirka í Føroyum verður í § 1, stk. 1 aftaná „meirvirka“ sett: „á landi“.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 15. juli 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 101 15. juli 2011

# Kunngerð um broyting í kunngerð um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum

**§ 1**

Í kunngerð nr. 117 frá 14. november 2005 um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum, sum broytt við kunngerð nr. 85 frá 9. juli 2010, verður § 19 orðað soleiðis:

*„Sild og gulllaksur*

**§ 19.** Tá sild ella gulllaksur verður veiddur við uppsjóvartroli, mugu meskarnir ikki fara niður um 35 mm.

*Stk. 2.* Hjá fiskiførum, sum hava loyvi at fiska annan uppsjóvarfisk, sum er undir kvotuskipan, er loyvt at hava hjáveiði av hesum fiskasløgum í beinleiðis veiði eftir norðhavssild ella heystgýtandi sild. Hjáveiðan verður roknað av eginkvotuni hjá viðkomandi fiskifari ella av felags kvotuni hjá viðkomandi fiskiførum.

*Stk. 3.* Hjá fiskiførum, sbrt. stk. 2, har kvotan av øðrum uppsjóvarfiski er uppfiskað, og hjá fiskiførum, sum ikki hava loyvi at fiska annan uppsjóvarfisk, sum er undir kvotuskipan, kann hjáveiðan av hesum fiskasløgum í beinleiðis veiði eftir norðhavssild og heystgýtandi sild í mesta lagi vera 5% av samlaðu vektini av veiðini fyri hvørja avreiðing, lating, uppskiping ella umskiping.

*Stk. 4.* Í beinleiðis veiði eftir norðhavssild, heystgýtandi sild ella gulllaksi má samlaða hjáveiðan av fiskasløgunum toskur, hýsa, upsi og kongafiskur ikki vera meiri enn 2% av samlaðu vektini av veiðini fyri hvørt hál. Hjáveiða av øðrum botnfiskasløgum er loyvd.

*Stk. 5.* Skiparin hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um íblandingin av øðrum uppsjóvarfiski, sum er undir kvotuskipan, ella botnfiski er størri enn tey í stk. 3 og 4 ásettu hámørk.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 15. juli 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 102 15. juli 2011

# Kunngerð um broyting í kunngerð um veiðu eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011

## § 1

Í kunngerð nr. 85 frá 8. juni 2011 um veiðu eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 11 verður „§ 6, stk. 1“ broytt til: „§ 6, stk. 2“, og sum stk. 2 verður sett:
„*Stk. 2.* Áðrenn fiskifar byrjar at partrola saman við einum øðrum fiskifari, skal fráboðan sendast Fiskiveiðieftirlitinum um, hvørjum partrolað verður saman við. Eisini skal fráboðan sendast Fiskiveiðieftirlitinum, tá partrolingin saman við fráboðaða fiskifarinum endar.“

2) Í § 12, stk. 2 verður „5 % av samlaðu vektini av veiðuni fyri túrin“ broytt til: „5 % av samlaðu vektini fyri hvørja avreiðing, lating, uppskiping ella umskiping.“, og sum stk. 3 – 5 verður sett:
„*Stk. 3.* Hjá fiskiførum, sum eru fevnd av stk. 2 og sum lata hvørt hál til móttøkuskip ella til flutningsskip á feltinum, verður hjáveiðan sbrt. stk. 2 roknað av í mesta lagi 5 hálum.
*Stk. 4.* Hjá fiskiførum, sum eru fevnd av stk. 2 og sum framleiða ella frysta veiðina umborð, kann hjáveiðan, hóast ásetingina í stk. 2, tó ongantíð verða meir enn 10 % av samlaðu vektini av veiðuni fyri eitt tíðarskeið uppá 5 døgn.
*Stk. 5.* Skiparin hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um íblanding av øðrum uppsjóvarfiski, sum er undir kvotuskipan, er størri enn 5 % av samlaðu vektini av veiðuni í hvørjum háli.“

3) Í § 27, stk. 1 verður „§ 11, 2. pkt., § 12, stk. 2“ broytt til: „§ 11, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2, § 12, stk. 2 – 5“.

## § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 15. juli 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705